

# Christal førir seg fram

MORGUNSENDINGIN MIKUDAGIN 9-12

Christal er eitt nýtt navn í donskum popptónleiki, sum rættiliga ger vart við seg í hesum døgum. Christal er Julia Christa Svabo Andersen, sum er ættað úr Miðvági. Hon er uppvaksin í Danmark, men hevur sjálv lært seg føroyskt, og nú skal hon verða poppstjørna í Danmark. Vit spæla sangin, sum Christal skal vinna fram við, og vit tosa við songkvinnuna.

RÁS 2 ...títt radio

# Skráin hjá Rás2

## Heilsanir til Ynskiløtuna

Send heilsanir til Ynskiløtuna umvegis heimasíðuna www.ras2.fo ella við SMS-boði á tlf. 52 00 00

## Mánadagur 16. nov.

17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
18:45 Tónleikur
21:00 Reflex – Ungdómssending hjá Heimamissiónini
22:00 Halleluja
00:00 Liðugt



Á TORGINUM TÝSKVØLDIÐ 21.00

## Á Torginum

Gestur verður Odmar Færø, yvirlækni. Absalon Absalonsen leggur til rættis

## Týsdagur 17. nov.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending – Barbara Holm og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
11:00 Tíðindi
11:10 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lysingar
14:00 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:05 Tónleikur
16:00 Tíðindi
16:10 Tónleikur
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
21:00 Á Torginum
22:35 Tónleikur
00:00 Liðugt

## Mikudagur 18. nov.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsendingin – Eyðun Klakstein og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:10 S&S
16:00 Tíðindi
16:10 ShopTop – Alvin Ellebye Andersen leggur til rættis
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
21:00 Úr skjáttuni – Prátað verður við trúboðaran Maureen Clarke, millum annað um eina skakandi hending í summar. Frants Jensen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt



## Morgunsendingin týsmorgunin

Í morgunsendingini týsmorgunin vitja starvsfólk hjá Margarinfabrikkini í rásarúminum, og fara tey at greiða frá tiltakinum Sement, sum fer av bakkastokki í næstum.

Og seinasta tíman av morgunsendingini vitjar kendi útvarpsmaðurin Høgni Mohr í rásarúminum, og hann fer at spæla síni yndisløg og greiða frá um lív sítt sum útvarpsmaður.

Vertir eru Barbara og Mirjam.









Búgv sum ein greivi

# Vinn vikuskifti í BAKKASTOVU

Ver við í spurnarkappingini á Rás2 og vinn eitt vikuskifti í Bakkastovu við Ljósá

"Ein perla" verður ofta sagt um nakað gott ella vakurt, sum vit ikki reiðiliga duga at seta orð á. Vit hava hug at siga "ein perla" um Bakkastovu við Ljósá. Hetta nýggja húsið er stílreint og einkult við nøkrum sjálvsomum detaljum – tó sermerkt vegna sína plasering beint omanfyri bátahavnina.

Tú kanst eygleiða fuglar, sum flúgva tætt framvið vindeygunum, og kópar, æður o.a., sum spæla sær í sjónum. Við Ljósá á sumri sæst sólin seta í havsbrúnni mitt í Eiðisflógva.

Hetta kanst tú koma at njóta, um tú sendir SMS-boðini »SoS« til 1940 (prísurin er 30 kr. fyri hvørt sms).

Lutakast verður millum øll tey, sum hava sent inn, og tey, ið sleppa við í sendingina, skulu svara 10 spurningum í almennari vitan. Tvær ferðir kanst tú fáa hjálp at svara. Klárar tú ígjøgnum spurnarkappingina, er vinningurin tín.

